# Grækarismessuhald og 35 ára hald

**Grækarismessuhaldið í Vági í ár var eitt sindur øðrvísi enn vanligt. Tað eru 35 ár síðani Skótaliðið Royndin varð endurstovnað og gjørt var burturúr eftir sjálvt grækarismessuhaldið í Vági, har røðarin var ein teirra, sum endurstovnaði skótaliðið og sum starvaðist sum prestur í Vági tá**

GRÆKARISMESSA
*Dagfinn Olsen*



*Kjartan Mørkøre, prestur, helt grækarismessurøðuna í Vági í ár. Hann var millum teirra, sum endurstovnaði skótaliðið Royndina fyri 35 árum síðani. Hann starvaðist tá í Vági. Á myndini eru eisini aðrir skótahugaðir menn: Jákup Olsen, Kjartan Dalsgarð og Bent Mortensen*

*(Mynd: D.Olsen)*

Grækarismessa er 12. mars, men vanligt er at hava grækarismessuhald sunnudag. Í Vági var eisini hald, eins og undanfarin ár.

Kjartan Mørkøre, prestur, helt røðu, sum hann m.a. bygdi á hornasteinarnar mál, mentan, tjóðskap og umhvørvi. Kirkjukórið Ljómur setti dám á tiltakið, sum kórið vanliga ger til tiltøk í Vági. Fitt av fólki hevði leitað sær til grækarismessuhald, hóast veðrið ikki var av tí besta, men ein skái var løtuna, haldið fór fram.

### 35 ára hald

Røðarin í Vági í ár, Kjartan Mørkøre, leitaði so at siga aftur á slóðina. Hann starvaðist sum prestur í Vági fyri 35 árum síðani og var tá ein teirra, sum endurstovnaði skótaliðið Royndina, saman við Jákupi Olsen og øðrum.

Onkur av stovnarunum fyri 35 árum síðani, eins og gamlir skótar, taldust millum áhoyrararnar og eisini Kjartan Dalsgarð, kendur skóti í mong ár, og sum hevur fingist nógv við landsumfatandi skótaarbeiði, t.d. deplin á Selatrað, hevði leitað sær suður til Vágs í samband við dagin.

Royndin varð uppruna-liga stovnað í 1940, tá Thulesen prestur stóð á odda, men arbeiðið datt niðurfyri í sekstiárunum, fyri síðani at verða endurreist í 1968.

Eftir grækarismessuhaldið var móttøka í skótahúsinum, har kaffi og køkur vóru at fáa. Men umframt var høvi hjá vitjandi og núverandi og fyrrverandi skótum at síggja myndir frá ymsum legum og lesa gamlar dagbøkur. Tilfar var lagt fram og røður hildnar og Sosialurin fer komandi at kaða nærri at hesum forvitnisliga tilfari.

Skótaliðið Royndin telist millum elstu lið í landinum, um enn ikki tey størstu, og er vanliga á legum í Føroyum og í útlondum og nógv hevur verið vitjað í Íslandi. Fyri stuttum hevur Royndin eisini gingið Suðuroyna á tamb, úr enda í annan, so lív er framvegis í, nú 35 ár eru síðani endurstovnan.





Søkt verður eftir
**Lærlingi**

Vit sóknast eftir lærlingi til Profa Gólv at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið sum lærlingur umfatar samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði.

**Førleikakrøv**
Tað er kravt, at tú hevur eina vanliga handilsskúla-útbúgving (FHS).

Tað er ein fyritreyt, at tú ert fyrikomandi, sjálvstøðug/ur, álitandi og kundavinarlig/ur og hevur góð samstarvsevni.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn saman við avriti og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 01.04.03

**Profa Gólv**
Smyrilsvegur 7 · 100 Tórshavn · Tel 32 24 94




# Snelludagar gjørdust til línudagar

**Línuskipið Jógvan S hevur fingið fiskiloyvi frá einum útróðrarbáti, sum bara hevði loyvi at royna við snellu undir Føroyum**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Línuskipið Jógvan S hevur fingið tvey fiskiloyvi úr tveimum øðrum skipabólkum, enn Jógvan S hoyrir til*

Skjøl fra Fiskiveiðieftirlitinum vísa, at útróðrarbáturin Nakkur, sum er annað skipið, ið skal lata fiskiloyvi til Jógvan S, hevur fingið dupult so nógvar fiskidagar tillutaðar, sum Fiskimálaráðið hevur upplýst.

Rólant Poulsen, formaður í felagnum línuskip, sigur, at hann hevur fingið at vita frá Fiskiveiðieftirlitinum, at útróðararbáturin Nakkur, sum fyrr æt Barðið, í hesum fiskiárinum hevur fingið tillutaðar 158 fiskidagar móti teimum 80, hann hevði í fiskiárinum 2001-2002. Hesir 80 dagarnir eru eisini tað, sum Fiskimálaráðið hevur upplýst saman við døgunum hjá Skørini at liggja sum grundarlag undir fiskiloyvinum hjá Jógvani S.

Eisini hevur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum boðað frá á tingsins røðarapalli, at hesir 80 dagarnir eru tað, Nakkur hevur latið til Jógvan S.

Men við skjalainnliti frá Fiskiveiðieftirlitinum verður nú váttað, at dagatalið er tað dupulta í hesum veiðiárinum. Kortini er talan um snelludagar, sum við umrokning eru gjørdir til helvtartal av línudøgum. Formaðurin í Felagnum Línuskip er ikki nøgdur við, at hetta verður sett upp soleiðis.

– Tað er heilt ótrúligt, sigur Rólant Poulsen, at slíkt kann koma fyri. Annaðhvørt hava bæði embætisfólkini í Fiskimálaráðnum, sum hava latið skjalainnlitið, og landsstýrismaðurin, sum var á røðarapallinum í Løgtinginum, sagt ósatt. Ella hava tey ikki vitað betur, og hesir dagarnir so eru tillutaðir efitr, at hini uppýsinarnir eru komnir út.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur í viðmerking til nýggju tølini, Sosialurin hevur fingið, at hann er ikki vitandi um hatta skjalið.

Tað hann hevur fingið at vita og hevur borið víðari, er, at talan er um 80 dagar, sum Nakkur hevur havt at latið til Jógvan S. Hann hevur sum øll onnur gingið út frá, at talan var um línudagar.

Formaðurin i Felagnum Línuskip, Rólant Poulsen, heldur, hetta bendir á, at Nakkur nú knappliga hevur tvey fiskiloyvi, tá hann hevur so nógvar dagar.

So eru vit aftur við eitt annað mál, sum kemur í stríð við grein 8 í lógini um vinnuliga fiskiskap. Ta lógina, sum Fiskimálastýrið sigur liggja til grund fyri hasari viðgerðini.

Sambært teirri lógargreinini og útleggingini hjá Fiskimálaráðnum, er bert loyvt at leggja tvey fiskiloyvi saman, fingin frá skipum, sum løgd eru med alla og ikki skulu aftur í flotan.

Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum sigur, at teir 158 fiskidagarnir, nevndir eru í uppgerðini hjá Fiskiveiðieftirliitnum fyri Nakk, eru snelludagar. Umroknaðir til línudagar, verða teir hálveraðir og sostatt 79,5 ella teir 80 í tali, sum upplýst er frá Fiskimálaráðnum.

Men so kemur aftur ein annar spuringur upp. Og hann er, hvussu ein útróðrarbátur, sum er ræðisavmarkaður til at fiska við snellu nú knappliga kann selja línudagar til eitt linuskip í heilt øðrum høvuðsbólki?

Sosialurin hevur biðið um innlit í málið hjá Fiskimálaráðnum, men hevði ikki fingið svar, áðrenn blaðið fór til prentingar seinnapartin mánadagin .



*Annað loyvið er fra útróðrarbátinum Skørini, sum í síni tíð fekk fiskiloyvi frá einum upp aftur minni útróðrarbáti, sum varð lagdur. Hitt fiskiloyvið er frá úróðrarbátinum Nakki, sum er ræðisavmarkaður til at fiska við snellu og hevur snelluloyvi, men nú letur einum línuskipi línudagar á ytru leiðunum*

## Meira gjøgnumskygni skal til

**Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum vil sleppa undan meira roki um fiskidagar av tí slagnum, vit hava sæð seinastu vikuna**

FISKIDAGAR
*Edvard Joensen*



Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum vil koma tí hurlivasa, sum tykist valda í samband við lógina um vinnuliga fiskiskap, til lívs.

Fleiri eru, sum halda lógina vera bæði torskilda og mótsigandi og kunna toyggjast sum best ber til, alt eftir hvør hálar í.

Men nú skulu kunngerðir gerast, sum ikki skulu vera til at misskilja, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum í tíðindaskrivi.

Til tess at skapa størri gjøgnumskygni í umsitingini av slíkum málum fer landsstýrismaðurin at taka stig til, at í nærmastu framtíð verða kunngerðir gjørdar, sum staðfesta tær umsitingarligu mannagongdirnar, sigur hann.

Øll endalig avgreiðsla av málum um samanleggingar av veiðuloyvum og avhending av fiskidøgum verður útsett, til kunngerðirnar eru endaliga lýstar og settar í verk, sigur landsstýrismaðurin.